# Gull vert at arbeiða í skotsku oljuvinnuni

**– Royndirnar eg fái her í Aberdeen eru gull verdar fyri meg. Tú sleppur at arbeiða við tingum, sum eru rættiliga specialiserað og so sleppur tú at gera ting, sum tú ikki fær gjørt í Føroyum sigur Rúni Joensen, sum starvast sum designverkfrøðingur hjá skotskari oljufyritøku. Hann mælir føroyingum til at fara til Aberdeen at lesa og at arbeiða har, áðrenn farið verður heimaftur**

OLJUVINNA OG ÚTBÚGVING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*




*Rúni Joensen, sum arbeiðir í skotsku oljuvinnuni, her á oljumessuni í Aberdeen saman við Eyðun Elttør, landsstýrismanni. Mynd Jan Müller*

Millum tey vitjandi á oljumessuni í Aberdeen herfyri vóru eisini fleiri føroyingar, sum arbeiða í skotsku oljuvinnuni – og sum hava fingið sær útbúgving í Skotlandi. Ein teirra er 26 ára gamli Rúni Hansen úr Havn. Hann læs í Aberdeen í fimm ár og hevur útbúgving sum mekaniskur verkfrøðingur. Hann fór so beinleiðis frá universitetinum í oljuvinnuna at arbeiða og hevur eitt ár á baki . Hann starvast hjá Elmar Services, sum er eitt dótturfelag hjá Barco. Teir framleiða útbúnað til oljuvinnuna so sum mastrar, kontrolstýriútgerð, fóðring til boring ol. Í fyritøkuni arbeiða umleið 300 fólk. Rúni arbeiðir har sum designverkfrøðingur.

Hóast Føroyar draga so heldur Rúni tað vera sera týdningarmikið at kunna fáa sær royndir í vinnulívinum aðrastaðni. – Royndirnar eg fái her í Aberdeen eru gull verdar fyri meg. Tú sleppur at arbeiða við tingum, sum eru rættiliga specialiserað og so sleppur tú at gera ting, sum tú ikki fær gjørt í Føroyum.

Rúni vil avgjørt mæla føroyingum, sum fáa sær útbúgving í útlandinum, eisini at fáa sær royndir har, áðrenn teirelita sær heim aftur til Føroya. Ja tað er spill at fara beint heim frá skúlanum.

Rúni heldur tað eisini vera ein góða gongd, at fleiri og fleiri føroyingar velja at fara aðrastaðni at lesa eisini enn bara at fara til Danmarkar. Nú tá stuðulin er so góður, so er tað eins bíligt at fara til Skotlands at lesa sum til Danmarkar. Hann skilur ikki, hví ikki fleiri føroyingar velja at fara til Aberdeen at lesa.

Rúni heldur tað vera ein stóran fyrimun at fara t.d. til Skotlands at lesa, tí tá at lærir man enskt til fulnar, og so er Skotland eisini nógv meira multikulturelt samfelag enn t.d. Danmark. Á universitetinum eru fólk úr nógvum tjóðum. Tú lesur og býr saman við teimum, so tað er ikki sum nógva staðni í Danmark, har bara føroyingar eru saman. Eg haldi man veksur nógv við hesum.

Rúni, sum vitjaði føroyska básin á oljumessuni í Aberdeen nú um dagarnar, heldur tað vera rætt av føroyingum at vera við til slíka messu, tí vit skulu hyggja nógv ár fram hvat eini oljuvinnu viðvíkur. Tí umræður at vera við frá byrjan og fylgja væl við í tí, sum fer fram rundan um teg.

- Fara føroyingar úr myndini nú, so verður ringt at koma innaftur.

Sjálvur hevur Rúni ein dreym um at koma heimaftur til Føroya ein dag at arbeiða í føroysku oljuvinnuni. Hvat tí føroysku luttøkuni í oljuvinnunu í løtuni viðvíkur, so er tað avmarkað,. hvat vit kunnu gera. Hann heldur, at tað eru fyrst og fremst skipasmiðjunar, sum skulu taka avbjóðingina upp. Føroyingar duga eins væl at sveisa sum skotar. Slíkt arbeiði kanst tú tí lættliga gera í Føroyum.




# Svenskt nei til evruna ávirkar Danmark

MARKNAÐARRÁK
*Kaupthing*

Fólkaatkvøðugreiðslan í Svøríki sunnudagin vísti, at ein greiður meiriluti av svium ikki ynskja at nýta evruna sum gjaldoyra. 56,1% atkvøddu nei og einans 41,8% ja. Tað er ikki óvanligt, at kenslurnar ráða, tá atkvøðast skal um slík torskild stórmál, og eftir ræðuliga morðið á ráðharran Onnu Lindh var tí hugsandi, at ja-vongurin fór at toga eitt sindur inn á nei-vongin, men so gjørdist ikki. Svenska krónan viknaði nakað mánamorgunin, men av tí at eitt nei var væntað, er sannlíkindið fyri einari óstøðugari svenskari krónu lítið.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni er áhugavert fyri støðuna hjá Danmark mótvegis evruni. Hóast danir, eftir at evran varð sett í umferð í evropisku londunum, eru vornir meira fyri einari evru, metir Marknaðarrák, at úrslitið í Svøríki er ein stuðul til danska nei-vongin. Samstundis kann roknast við, at longur fer at ganga til fólkaatkvøða um evruna, aftur verður í Danmark.

Eftir at vit í longri tí, at kalla, einans hava sæð bjartar búskaparligar uppgerðir úr USA, vóru meira vánalig tøl kunngjørd fríggjadagin. Millum annað gjørdust sølan av vanligum vørum og ein uppgerð av brúkaraálitinum eitt vet verri enn væntað. Tað er ein sannroynd at tað gongur betur í amerikanska búskapinum og góð útlit eru fyri hækkandi virksemi í 3. ársfjórðingi. Kortini er hugsandi, at marknaðarluttakarar hava verið ov bjartskygdir og at ávísar lánsbrævarentur eru hækkaðar eitt vet ov nógv og ov skjótt. Møguleiki er tí fyri, at lánsbrævarentur næstu vikurnar stundum kunnu lækka. Hinvegin metur Marknaðarrák framvegis, at tá vit nærkast árskiftinum vilja longru lánsbrævarenturnar liggja á sama stigi sum í dag ella eitt vet hægri. Fleiri áhugaverdar hendingar verða hesa vikuna - hendingar sum kunnu ávirka marknaðirnar. Á gjaldoyraøkinum er áhugavert, at ein uppgerð fyri amerikanska gjaldsjavnan í 2. ársfj. verður kunngjørd. Hallið á gjaldsjavnanum er støðugt hækkað seinastu árini og er vorðið metstórt. Um eisini talið hesa vikuna vísur eitt økt hall, kann dollarin vikna móti evruni og donsku krónuni.

Roknað verður ikki við, at amerikanski tjóðbankin (FED) broytir rentuna á fundi teirra týsdagin 16. september og hetta vil ikki ávirka. Hinvegin fer allur fíggjarheimurin at lurta eftir, hvat sagt verður eftir fundin. Um bjartskygnið hjá FED verður varðveitt, fara lánsbrævarenturnar at halda støðið ella at hækka, og hetta vil eisini stuðla gongdini á partabrævamarknaðunum.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,83% | -0,05% | ↓ |
| 5 ára lánsbræv | 3,66% | -0,08% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 4,40% | -0,09% | ↓ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 253,1 | 1,0% | ↑ |
| OMX, Svørki | 607,7 | -1,2% | ↓ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.513,0 | -1,9% | ↓ |
| S&P 500, USA | 1.018,6 | -1,3% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv DKK | 106,62 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 164,21 | 0,3% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 69,59 | -1,6% | ↓ |
| Altjóða Partabrøv | 74,75 | -0,5% | ↓ |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 658,86 | -1,8% | ↓ |
| EUR | 742,61 | 0,0% | → |
| GBP | 1.057,25 | -0,5% | ↓ |
| NOK | 89,86 | -0,1% | ↓ |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 25 ára starvsdagur hjá Færøernes Kommando



*Oberstløjtnantur Preben Skovgaard h.m. handar her Palle K. Rasmussen, marinespecialisti, diplom á 25 ára starvsdegnum*
*Mynd: Færøernes Kommando*

13. september 2003 kundi marinespecialistur Palle K. Rasmussen, Stykkið, halda sín 25 ára starvsdag hjá donsku sjóverjuni.

Palle er útbúgvin sum sølumaður hjá Austin Reed Ltd í Danmark og Svøríki. Liðugur við hesa útbúgving bleiv hann kallaður inn til hertænastu hjá donsku sjóverjuni.

13. september 1978 byrjaði Palle á Søværnets Grundkursus í Auderød við eftirfylgjandi útbúgving á Søværnets Signalskole (SIS) á táverandi Flådestation København (Holmen). 23. november 1978 bleiv kósin eftir egnum ynski sett móti Føroyum. Her gjørdi hann seg lidnan við hertænastuna við at arbeiða sum signaloperatørur á Flåderadio Tórshavn (Marinestation Thorshavn). Síðan skrivaði hann undir sáttmála og helt fram at arbeiða í Føroyum.

Í 1985 var hann aftur á Søværnets Signalskole í eitt ár, har hann tók útbúgving sum hernaðarligur fjarritari við certifikati sum radiotelefonistur. Síðan fór hann aftur í starv á Marinestation Thorshavn.

Frá 1994-96 var hann í tænastu hjá Flåderadio Grønnedal í Grønlandi, og var hann m.a. á skeiði hjá Helikopter Information Service hjá Grønlandsfly í Nuuk. Frá Statens Luftfartsvæsen fekk hann "VHF-Radiotelephone Operator License For Ground Personnel.

Eitt tíðarskeið í 1997 arbeiddi Palle á Flåderadio Århus (Søværnets Operative Kommando).

Palle hevur hesi árini verið álitismaður og í eitt langt tíðarskeið eisini felagsálitismaður á sínum arbeiðsplássi. Hann hevur verið til øll neyðug skeið hesum viðvíkjandi, og umboðar hann í dag Søværnets Konstabelforening hjá Færøernes Kommando.

Á Føroya Handilsskúla hevur Palle tikið prógv í leiðslu og samstarvi, virkisbúskapi, virkisleiðslu og í roknskapi.

Flaggdagin 1980 giftist Palle við Marin, av Stykkinum, og hava tey búð á Stykkinum síðan tá. Tey eiga trý børn: Bárður, Barbara og Benjamin.

Í november 2000 bleiv Palle valdur í stýrið fyri Kvívíkar Kommunu , og er hann í fleiri nevndum har. Hann umboðar kommununa í Ráðnum fyri Ferðslutrygd og í kommunala skattaklaguráðnum fyri Norðstreymoyar Øki.

## Silvurbrúðarparið Haraldsen, Miðvági

Týsdagin 16. september 2003 kunnu hjúnini Nicolina og Jóhannes Haraldsen, Miðvágur, halda silvurbrúdleyp.

Nicolina er dóttir Leu f. Jacobsen av Slættanesi og Andrias Johannesen úr Miðvági.

Nicolina hevur útbúgving innan fiskivinnutøkni frá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og arbeiðir sum eftirlitsfólk á Føroya Fiskavirking í Miðvági.

Johannes er sonur til Thorborg f. Johannesen og Niels Juul Haraldsen bæði úr Miðvági.

Niels Juul var ein teirra, ið gekk burtur við "Sjeystørnuni" 9. februar 1973 millum Føroyar og Ísland.

Johannes lærdi til elektrikara hjá Hjalgrím Davidsen í Havn og hevur seinnu árini silgt sum maskinmeistari við "Polar Princess".

Johannes og Nicolina eiga 3 børn. Nomi 28 ár, Leila 24 ár og Thomas Jul 17 ár.

Silvurbrúðarparinum verður ynskt hjartaliga tillukku á degnum.

## Tveir nýggir námsfrøðingar



*Borghild Tómasson og Rannvá á Steig, Klaksvík, hava í summar 2003 lokið útbúgving sum námsfrøðingar á Højvang Seminarium, Glostrup*

## Tveir nýggir politistar



*1. august 2003 høvdu Janus Mohr Kjærbo, Vágur, og Mariann Reinert, Tórshavn, lokið útbúgving sum politistar.*

*mynd: Kristian Dahl*




## Dagurin

**16. september. Eufemia,** deyð umleið ár 300. Kvinnuligur pínsluváttur, tikin av døgum undir Diocletianus keisara. Femja er konufólkanavn, sum hevur verið brúkt í Føroyum og eisini kemur fyri í nýggjari tíð.

Grikskt navn sum merkir *gott umdømi.*